Kommunufelagið

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
Postboks 377
110 Tórshavn

6. februar 2019

Okkara j.nr.
19/00009-4

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j.nr.
Skrivið her

**Viðv.: uppskotum til kunngerðir innan aling**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til uppskotini til kunngerðir innan aling, ið eru send felagnum til hoyringar.

Talan er um fylgjandi uppskot til kunngerðir:

- Stovnan og sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum
- Úbjóðing av aliloyvum
- Tillutan av aliloyvum

Kommunufelagið hevur ikki ítøkiligar viðmerkingar til sjálvt innihaldið í uppskotunum, men fer felagið tó at loysa sær at koma við nøkrum generellum viðmerkingum.

Tá broytingar í lógini um aling av fiski vóru fyri á sumri 2017, kom Kommunufelagið við fylgjandi viðmerkingum í hoyringarskrivi, dagfest 27. juni 2017:

> Í uppskotinum verður lagt upp til, at landsstýrismaðurin í kunngerð kann áseta, hvørji land- og sjóøkir kunnu verða nýtt til aling.
>
> Hertil skal viðmerkjast, at tá landsstýrismanninum verður heimilað í kunngerð at áseta, hvørji landøki kunnu verða nýtt til aling, so eigur Vinnumálaráðið at hava í huga, at sambært galdandi lóg býarskipanir- og byggisamtyktir, eru tað kommunurnar, ið eru skipanarmyndugleiki á landøkjum, og tí mugu heimildirnar hjá landsstýrismanninum at loyva alivirksemi á landi, liggja innanfyri tær ásetingar, ið galda í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir, umframt møguligum ásetingum í býarskipanum ella byggisamtyktum, ið galda fyri tey lokaløki, ið ætlanin er at leggja út sum aliøki.
>
> Tí eigur at verða viðmerkt, antin beinleiðis í lógartekstinum ella í viðmerkingunum, at hesar heimildir sjálvsagt ikki eru ætlaðar at ganga framum galdandi lóg um býarskipanir- og byggisamtyktir, ella galdandi býarskipanir ella byggisamtyktir, soleiðis at hesin spurningur ikki seinni gerast eitt ivamál, og at eitt aliloyvi ikki frítekur aktørin fyri at fáa øll onnur loyvi tilvega frá øðrum avvarandi myndugleikum.

Í skjali, nevnt hoyringsnotat, dagfest 29. november 2017, framlagt sum skjal 19 í sambandi við framløguna í løgtinginum, sæst á síðu 6 og 7, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur endurtikið nevndu orðing og viðmerkt hana, og vísir ráðið til § 11 í alilógini, sum ásetur, at

aliloyvi ikki kann verða givið og aliøki kann ikki verða tillutað, um hetta stríðir ímóti byggisamtyktum og býarplanum v.m.

Henda orðing er nú endurtikin í kunngerð um tillutan av loyvum í § 9 um tillutan av loyvum og § 20 um leingjan av loyvum.

Kommunufelagið loyvir sær at vísa á, at sambært kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð, sum er heimilað í byggi- og býarskipanarlógini, er ásett í § 1 at

> Kommunustýrir kunnu ikki geva byggiloyvi ella nýtsluloyvi, fyrr enn tað er staðfest, at tað sum søkt verður um, eisini kann góðkennast av øðrum myndugleikum, ið sambært aðrari lóggávu hava heimild at seta krøv til byggingar.

Henda áseting, saman við ásetingunum í Byggilógini, regulerar kommunalu byggimálsviðgerðina og tilgongdina. Hinvegin sæst t.d. í kapittul 3 um rakstur av alibrúkum í kunngerðini um stovnan og sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan somuleiðis hevur heimild at seta krøv til bygningar.

Tað sæst ikki, um ella hvussu ætlanin er at fyrihalda seg, um soleiðis skuldi komið fyri, at myndugleikarnir eru ósamdir ella hvør í sínum lagi geva loyvir, sum ikki samsvara hvørt við annað, ella um ivamál uppstendur um myndugleikabýti í sambandi við bygging.

Tað sum eisini kann blíva ein størri trupulleiki í praksis er, at hóast ásett er í lóggávuni, at loyvir ikki kunnu veitast ella leingjast, sum stríða móti byggisamtyktum o.t., so er broyting í eini byggisamtykt, soleiðis at eitt øki verður lagt av til t.d. aling á landi, ein politisk tilgongd og fyrisitingarlig tilgongd, sum kann vera tung og tíðarkrevjandi bæði fyri borgarar og myndugleikar.

Uttan mun til um talan er um byggimálsviðgerð í sambandi við givin aliloyvir ella broyting í byggisamtykt í sambandi við ætlaða aling á landi, so krevur hetta neyvt samstarv og samskifti millum kommunalar byggi- og skipanarmyndugleikar og myndugleikarnar sambært alilóggávuni, og tí átti at verið umhugsað at ásett eina (sam-) skipaða mannagongd, við tí endamáli at tryggja borgarum, vinnulívi o.ø. aktørum skjóta og fullgóða málsviðgerð.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri